# Leirvíkingar fáa nú søgu sína

**Í Helsinge á Norðursælandi situr ein vælkendur leirvíkingur og skrivar bygdarsøgu um heimbygdina, ið gongur fleiri øldir aftur í tíðina. Tað er Martin Fjallstein, sum til fyri góðum ári síðani var leiðari í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Eitt starv hann røkti í 11 ár**

## Bygdarlív



**Kári Mikkelsen**
karim@sosialurin.fo

Tey seinnu árini hava nógvar greinar verið í bløðunum, sum hava umrøtt partar av bygdarsøguni í Leirvík. Høvundurin er ein vælkendur útiseti, Martin Fjallstein, ið sjálvandi framvegis er leirvíkingur við stórum L.

Martin Fjallstein hevur havt sera stóran áhuga fyri heimbygdini, og er uttan iva tann bygdarmaðurin, sum veit mest um Leirvík. Tí var tað ikki av tilvild, at stigtakararnir til at fáa givið út eina bygdarsøgu, heittu á Fjallstein um at standa á odda fyri hesum arbeiðinum. Ein verkætlan, sum høvundurin sjálvur hevur roynt at fingið gongd á onkuntíð, men sum er so mikið stórt stig at fara undir, at tað ikki letur seg gera uttan góðan stuðul. Ikki minst fíggjarligan. Hesin fekst til høldar í fjør.

Sosialurin hitti Martin Fjallstein í páskuvikuni á hansara fyrrverandi arbeiðsplássi, ið var Føroyahúsið í Keypmannahavn. Eitt vælumtókt hús fyri nógvar fastbúgvandi útisetar á Sælandi og serliga á høvuðsstaðarleiðini, sum leirvíkingurin var leiðari fyri í 11 ár, til hann 1. februar í fjør legði frá sær og fór undir at fyrireika útgávuna av bygdarsøguni.

11 ár ljóðar kanska ikki av so øgiliga nógvum. Men tá hugt verður eftir, hvat slag av arbeiði hetta er, har arbeiðstíð og frítíð í stóran mun rekur saman, so er tað ein krevjandi uppgáva at røkja. Serliga tá ein er so nærlagdur sum Martin Fjallstein.

Prátið við fryntliga og gløgga leirvíkingin kom sjálvandi fyrst inn á, hvussu tað var at gevast sum leiðari av Føroyahúsinum, og hvussu seinasta árið hevur háttað sær, nú hann sleppur undan at taka dagliga túrin úr Helsinge á Norðursælandi, har familjan Fjallstein býr, og inn á Vesturbrúgv í sjálvum hjartanum av Keypmannahavn.

- Eg var í eini tvístøðu, um eg skuldi gevast, tí tað vóru sera nógv fólk, sum vóru góð við meg og stuðlaðu mær væl bæði í tí praktiska arbeiðinum, men eisini til at møta upp til tey ymsu tiltøkini í húsinum. Hinvegin, so var eg blivin 60 ár og merkti, at kroppurin byrjaði at geva eftir. Tað var torført at noyðast at arbeiða vikuskifti eftir vikuskifti, nátt sum dag, umframt at røkja vanliga arbeiðsdagin ígjøgnum vikuna. Eisini eru tíðirnar so nógv broyttar við tí skjóta samskiftinum, góða ferðasambandinim, nýggja tónleikinum og øllum øðrum tí nýggja. So eg helt, at tað gjørdi onki, um nýtt fólk kom til. Eisini var eg komin í tann aldur, at um skuldi eg royna nakað annað, mátti tað vera nú, vísir Martin Fjallstein á.

Hann sigur seg gleðast aftur á tíðina í Føroyahúsinum, ið hevur givið honum eitt spennandi og ríkt tíðarskeið í lívinum.



*Fyrrverandi leiðarin í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, Martin Fjallstein, er útbúgvin fólkaskúlalærari. Her avmyndaður saman við abbasoninum, Dia Fjallstein*
*Mynd: Kári Mikkelsen*

### Nógv fólk horvin

Við bygdarsøguni stóð ein heilt øðrvísi avbjóðing hjá Martini Fjallstein fyri framman.

- Nú hevur Leirvík altíð staðið mær nær, tí eg vaks upp har. Eg fór tó ungur heimanifrá; fyrst í skúla í Fuglafirði, so í Havn og haðani av landinum. Men av tí at foreldrini búðu har, og tú kom at vitja, umframt alt tað ríka, tú hevði fingið í barndóminum, hevur bygdin altíð staðið mær nær. Og so við og við havi eg skrivað nógvar smágreinar og savnað rættiliga nógv tilfar. Eg fari ikki at siga, at eg veit mest um Leirvík, men eg eigi óivað mest tilfar um bygdina og haldi tað vera spell, um alt hetta tilfarið ikki verður brúkt. Tí hevði eg hug at koma í gongd við hesa uppgávuna og fekk nakrar at sponsorera uppgávuna. Talan er um eitt øðrvísi arbeiði, ið er ógvuliga spennandi, sjálv um tað mangan er einsligt. Tú situr einsamallur við spurningunum og tí stóru uppgávuni, ein hevur fingið latið upp í hendi. Og tað gerst ikki eftir einum degi ella viku, men tekur sjálvandi ár, sigur bygdarsøguhøvundurin.

Uttan at vilja avdúka, hvør annar stendur aftanfyri bygdarsøguna, sigur Martin Fjallstein, at fyrst var tað hann, sum vendi sær til nakrar persónar, men tað bleiv ikki til nakað ta ferðina.

- Eftir at eg gavst í Føroyahúsinum, er tað síðani teir, ið hava vent sær til mín, og soleiðis er ætlanin komin í lag. Grunnurin Leirvíkar Søga er stovnaður, og haðani verður útgávan fíggjað.

*Tá tú gert eina bygdarsøgu, ið byggir á upplýsingar, so má tað vera eitt rættiliga stórt arbeiði at krosstjekka allar upplýsingarnar, tí annars er vandin stórur fyri, at tað koma nógvir feilir í. Hvussu gongur hetta arbeiðið fyri seg?*